Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 05.03.2021
Mál nr.: 20/00009
Málsviðgjørt: JEK
Eftirkannað: 12.02.2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin) og løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum
(Skattligar avleiðingar av negativari rentu o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:

"7) Negativar rentur."

2. Í § 10, stk. 1, 1. pkt. verður aftaná "rentuinntøkur" sett: ", herímillum negativar rentur á øðrum útlánskontum enn teimum, sum eru fevndar av løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum,".

3. Í § 10, stk. 1, 2. pkt. verður aftaná "rentuinntøkan" sett: "og negativa rentan".

§ 2

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 154 frá 13. desember 2017, verður gjørd henda broyting:

Í § 1 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 3*. Rentur av lánum, sum eru nevnd í § 2, verða lækkaðar við negativari rentu á útlánskontu, fevnd av § 2."

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Orsøkin til lógaruppskotið er fyrst og fremst eitt ynski um at tryggja vinnulívinum frádrátt fyri negativa rentu á innlánskontum.

Við uppskotinum verður staðfest, at negativar rentur, tað vil siga rentur, sum t.d. skulu rindast fyri at hava pening innistandandi í einum peningastovni, hava frádráttarrætt á sama hátt sum rentur, sum skulu rindast av skuld.

Gongdin seinastu árini við atliti at rentu hevur verið, at rentur fyri m.a. ávís realkreditlánsbrøv og innlánskontur eru ella skjótt kunnu gerast negativar.

Tað er higartil ikki tikin støða til skattsetingina av negativari rentu, og galdandi skattalóggáva hevur ikki meira nágreiniliga tikið hædd fyri íkomnu støðuni.

Men við uppskotinum verður staðfest, at negativar rentur skattliga skulu javnsetast við positivar rentur. Rentuútreiðslur hava frádráttarrætt, meðan rentuinntøkur eru skattskyldugar.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva heimilar ikki vinnulívinum frádrátt fyri negativa rentu. Heldur ikki heimilar galdandi lóggáva, at rentustuðulin verður javnaður við negativari rentu.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at fáa til vega eina heimild, sum loyvir, at vinnulívið fær frádrátt fyri negativa rentu. Í øðrum lagi er endamálið við uppskotinum at tryggja, at negativ renta á útlánskontum sum heild verður viðgjørd eins og rentuinntøka.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða kapitalvinningsskattalógin og rentustuðulslógin dagførdar við atliti at negativari rentu, bæði tá talan er um útlán og innlán.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur, orsakað av stutta skotbráðnum Fíggjarmálaráðið hevur havt til at skriva uppskotið, ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

At negativ renta á innlánum hjá vinnurekandi verður viðgjørd sum ein rentuútreiðsla ber við sær, at skattskylduga inntøkan lækkar. Ein møgulig negativ útlánsrenta ber hinvegin við sær, at skattskylduga inntøkan hækkar. Sí eisini fylgiskjal 2.

Tað hevur somuleiðis jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur, at negativa rentan fer at ávirka stuðulsloyvdu rentuna.

Tað hevur tó ikki verið gjørligt at fáa upplýst ítøkiliga, hvussu stór hendan ávirkanin verður, og er hetta m.a. grundað á, at negativa rentan hjá realkreditstovnunum ikki er statisk, men broytist leypandi. Rentustøðið hjá somu stovnum er eisini tengt at áramálinum, lántakarin ynskir eina fasta rentu, men dømið, sum er nevnt í serligu viðmerkingunum til § 2 í hesum uppskotinum, skuldi givið eina ábending um, á hvønn hátt uppskotið ávirkar land og kommunur fíggjarliga.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Við ásetingini verða tríggjar broytingar gjørdar í kapitalvinningsskattalógini.

Við tí fyrstu broytingini verður negativ renta javnsett við annan kapitalvinning, sum til dømis vinningsbýti og rentuinntøku.

Ásetingin er galdandi fyri likamligar persónar, feløg, grunnar o.o.

Til § 1, nr. 2 og 3
Við tí næstu og triðju broytingini verður negativ renta fyri feløg og grunnar o.o. roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni eftir skattalógini.

Fyri likamligar persónar verður negativ renta á øðrum útlánskontum enn kontum, sum geva rætt til rentustuðul, eitt nú rentur av húsalánum og stuðulslánum, javnmett við rentuinntøkur, sum verða tiknar við í uppgerðina í § 14 í kapitalvinningsskattalógini.

Til § 2
Við ásetingini verður eitt nýtt stykki sett inn í § 1 í rentustuðulslógini, sum ber við sær, at rentur av lánum, sum eru stuðulsloyvd sambært § 2 í rentustuðulslógum, verða lækkaðar við negativari rentu á útlánskontuni. Hetta kann t.d. vera gjald (bidrag) til realkreditstovn fyri eitt realkreditlán.

Dømi:
Rentan av útláninum er – 0,25%. Gjaldið (bidrag) til realkreditstovnin er 1%.

Stuðulsloyvda rentan er eftir hetta 0,75%.

Til § 3
Áseting um gildiskomu

Fíggjarmálaráðið, 05. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Upplýsingar um innlán og innlánsrentur hjá føroyskum fyritøkum